Fróðskaparsetur Føroya
University of the Faroe Islands

Søgu- og Samfelagsdeildin
Department of History and Social Sciences

# *Skeiðslýsing* *[Heyst] [2018]*

# *Module Description* *[Fall] [2018]*

| | |
|---|---|
| **Skeiðsnummar**<br><br>**Module Number** | 2296.18<br><br>2296.18 |
| **Heiti**<br><br>**Title** | Tilfeingisbúskapur<br><br>*Resource Economics* |
| **ECTS**<br><br>**ECTS** | 10<br><br>*10* |
| **Fortreytir**<br><br>**Prerequisite(s)** | Miðnámsskúlaprógv. Førleikar frá Mikro 1 og Mikro 2 eru avgjørdir fyrimunir.<br><br>*Completed upper secondary education. Competency in intermediate microeconomics is a definite advantage.* |
| **Stig**<br><br>**Level** | Bachelor. Valfak á SSD<br><br>*Bachelor. Elective at SSD* |
| **Endamál**<br><br>**Objective** | Endamálið við skeiðnum er at geva teimum lesandi innlit í hugtøk, ástøði og háttalag innan tilfeingisbúskap, og gera tey før fyri sjálvstøðugt at brúka hesi í verki.<br><br>*The objective of the course is to provide the students with insights into concepts, theories, and methods within the field of resource economics and give the students ability to use these in practice.* |
| **Innihald** | Skeiðið viðger samfelagsliga og vinnuliga handfaring og gagnnýtslu av trimum frummyndarligum “common pool” náttúrutilfeingjum – 1. fiskiríkidømi, 2. oljuríkidømi og 3. vatn og luft sum ruskspannir og reinsiverk fyri burturkast frá vinnuligum virksemi.<br><br>Skeiðið viðger trý grundleggjandi evnir innan samfelagsliga og vinnuliga handfaring og gagnnýtslu av “common pool” náttúrutilfeingi:<br>1. Alment regluverk fyri vinnuliga nýtslu av “common pool” náttúrutilfeingi: Lógir og reglugerðir, ið skilmarka og áseta rættindi og skyldur hjá vinnuligum aktørum og almennum |

| | |
|---|---|
| Content | myndugleikum mótvegis hvørjum øðrum í sambandi við handfaring og nýtslu av "common pool" náttúrutilfeingi.<br>2. Vinnulig optimering innanfyri givnar lógir og regluverk í "common pool" tilfeingisvinnum umframt marknaðarjavnvágir og vælferðarávirkan (realisering og býti av tilfeingisrentuni), sum standast av hesi atferð.<br>3. Politiska tilgongdin (umfatandi bæði formligu politisku prossessina, lobbyvirksemi, samráðingar millum áhugabólkar osfr), ið ásetir almenna regluverkið fyri vinnuliga nýtslu av "common pool" náttúrutilfeingi.<br><br>*The course considers the management and use of three archtypical "common pool" natural resources by society and firms: 1. Open sea fish resources, 2. Oil resources, and 3. Air and water as sinks for and purifiers of industrial waste.*<br><br>*The course considers three fundamental subjects regarding the management and use of "common pool" natural resources by society and firms:*<br>*1. The legal framework supporting industrial use of "common pool" natural resources: Laws and regulations, and the implied rights and duties impinging on economic actors, with respect to use of "common pool" natural resources.*<br>*2. Maximizing behaviour by firms utilizing "common pool" resources within a given legal framework, and the market equilibria and welfare economic consequences (retention and distribution of resource rent) resulting from this behaviour.*<br>*3. The political process, either involving negotiations among immediate group members or lobbying activities that take place at higher levels of government, which determines the legal framework supporting industrial use of "common pool" natural resources.* |
| **Læru og undirvísingarhættir**<br><br>Teaching Methods | Fyrilestrar, bólkaarbeiði, venjingar og framløgur.<br><br>*Lectures, group work, exercises and presentations.* |
| **Læru-úrtøka** | Tann lesandi skal eftir lokið skeið vera førur fyri:<br>• At definera hugtakið tilfeingisrenta og greina týdningin av tilfeingisrentu fyri búskaparfrøði um náttúrutilfeingi. |

| | |
|---|---|
| **Learning Outcome** | • At definera, hvat "common pool" tilfeingi er, og greina hvørjar serligar avbjóðingar hesi geva við atliti til samfelagsliga sæð skilagóða nýtslu, tvs. størst møguliga realisering av tilfeingisrentu.<br>• At skilja og endurgeva, hvørji sløg av rættindum og skyldum finnast við atliti til gagnnýtslu av náttúrutilfeingi, og leiklutin hjá tí almenna sum garantur fyri hesum rættindum og skyldum.<br>• Við formligum myndlum at greina, hvussu fyritøkur, ið brúka "common pool" náttúrutilfeingi í síni framleiðslu, velja sína framleiðsluætlan, alt eftir hvussu lógarverkið fyri gagnnýtslu av náttúrutilfeinginum er skipað.<br>• Við formligum myndlum at greina heildarjavnvágir í eini vinnu, ið gagnnýtir "common pool" náttúrutilfeingi, og vælferðareginleikar (realisering og býti av tilfeingisrentu) hjá hesum javnvágum, alt eftir hvussu lógarverkið fyri gagnnýtslu av náttúrutilfeinginum er skipað.<br>• At greina politisku tilgongdina, ið definerar rættindi og skyldur við atliti til "common pool" náttúrutilfeingi, undir hesum serliga hvørji viðurskifti hava ávirkan á, í hvønn mun prosessin framleiðir lógir og reglur, ið stuðla undir realisering og ynskiligt býti av tilfeingisrentuni.<br><br>*When the course is finished, the student should be able to:*<br>• *Define the concept of "resource rent" and explain the concept's central position in resource economics.*<br>• *Define the concept of "common pool" natural resource and explain the challenges these resources present for societies that want to use the resources in a productive fashion that retains as much resource rent as possible.*<br>• *Understand and explain what kinds of rights and duties are available with respect to framing the use of natural resources, and the role of the government as enforcer of these rights and duties.*<br>• *Explain, with the use of formal economic models, how firms that use "common pool" natural resources as inputs in their production choose their production plan contingent upon the* |

| | |
|---|---|
| | *specific laws, rules, and regulations framing the use of these natural resources.*<br>• *Characterize, with the use of formal economic models, market equilibria in an industry where firms use "common pool" natural resources as inputs in their production and how the welfare economic characteristics of these equilibria are contingent upon the specific laws, rules, and regulations framing the use of these natural resources.*<br>• *Analyse the political process which defines rights and duties with respect to "common pool" natural resources, in particular the determinants of the degree to which the process produces laws and regulations which support the retention and desirable distribution of resource rent.* |
| **Próvtøkuháttur**<br><br>**Assessment Method** | Skriftlig próvtøka.<br><br>*Written exam* |
| **Próvdøming**<br><br>**Examination** | innanhýsis<br><br>*Internal* |
| **Próvtalsstigi**<br><br>**Marking Scale** | 7-talsstigin<br><br>*7-point grading scale* |
| **Lestrarlisti**<br><br>**Bibliography** | TBA<br><br>*TBA* |
| **Ábyrgd**<br><br>**Contact** | **Jóannes Jacobsen**<br><br>***Jóannes Jacobsen*** |